# DAR UM NDIR



*Inni á høvuðsstøðini hjá NOFO, har tilbúgvingin koyrir alt samdøgrið. Johan Dahl og Petur Joensen her saman við Sjur Knudsen, stjóra og Oddbjørg Greiner, stjóra fyri operativu deildini.*

Mynd: Jan Müller







*Útgerð hjá NOFO at basa oljudálking á oljuráðstevnuni í Stavanger.*

Mynd: Jan Müller

útgerð, um so er at eitt óhapp skuldi komið fyri.

Undir vitjanini hjá NOFO fekk Johan Dahl eisini lyfti um, at felagsskapurin fegin vildi koma til Føroya at greiða frá virkisøki hansara og hvussu arbeiðið fer fram og harvið leggja føroyingum lag á at fáa eina góða tilbúgving, sum eisini er før fyri at taka sær av óhappum í sambandi við oljuboring til havs.

NOFO hevur 20 fólk í føstum starvi, 50 fólk á tilkallivakt og 80 fólk, sum eru knýtt at 5 útgerðarstøðum framvið norsku strondini. Sjur Knudsen sigur við Sosialin, at nú arbeitt verður við at bjóða út øki til leiting í Norðurnoregi, Barentshavinum og Arktis, so setur hetta enn størri og heilt nýggj krøv til tilbúgvingina. Í hesum sambandi eru tey hjá NOFO í ferð við at menna sína tilbúgving, so hon eisini kann handfara økini fyri norðan. Og her verður m.a. arbeitt við eini ætlan at gera avtalur við fiskiskip at veiðiplássunum í Norðurnoregi, sum tá ein part av árinum koma at virka sum hjálpar- og tilbúgvingarskip.

Johan Dahl sigur í eini viðmerking, at hetta eisini kann vera ein spennandi skipan at hyggja eftir í føroyskum høpi, tá vit eru komin longur ávegis við okkara leiting og vónandi framleiðslu eisini. NOFO varð so eisini eitt av feløgunum, sum luttók á altjóða oljumessuni í Stavanger í farnu viku.

jan@sosialurin.fo

## Oljusamstarv millum Føroyar og Bretland




*Johan Dahl og bretski orkumálaráðharrin Charles Hendry á oljuráðstevnuni í Stavanger í farnu viku*

Mynd: Jan Müller

Jan Müller

Undir síni vitjan á oljuráðstevnuni ONS í Stavanger í farnu viku nýtti Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálum høvi at hitta mong týðandi umboð fyri oljufeløg og myndugleikar í Noregi. Men hann fekk eisini orð á bretska starvsbróðurin, Charles Hendry, sum umframt at umsita orkuspurningar eisini hevur olju- og gassleiting og framleiðslu sum sítt øki. Teir prátaðu um ríku olju- og gassleiðirnar vestan fyri Hetland og umrøddu eisini møguleikan fyri at finna olju og gass á føroyska landgrunninum. –Charles Hendry var hugaður fyri einum samstarvi við føroyingar eitt nú í sambandi við flutningi av olju og gassi umvegis undirstøðukervið í bretskum øki, skuldi tað hent, at kolvetni verða funnin føroysku megin markið. Men hann er eisini talsmaður fyri varandi orku og her ikki minst vindorku og greiddi frá teimum stóru ætlanum at seta upp vindmyllur í Bretlandi her serstakliga til havs.

jan@sosialurin.fo